


*Skúlin á Trøllanesi er sum nýggjur, nú hann er umvældur og verður brúktur til mong ymisk endamál*

*Mynd: Dávur Winther*

# Aftur til heiður og æru

**TRØLLANES Skúlin á Trøllanesi hevur í nøkur ár verið undir umvæling. Henda er gjørd í góðum samstarvi við Innlendismálaráðið, sum hevur latið stuðul úr ein skipan, ið verður kallað »Stuðul til útoyggjamenning«**

**Snorri Brend**

Mikkjal Joensen hevur vegna kommununa staðið fyri umvælingini, og vóru fólk frá Landsverk og kommununi í síðstu vikuni norðuri á Nesi fyri at góðkenna umvælingararbeiðið.

– Sera væl frágingið, og nú eru ein lítil te-køkur, gong og wc, umframt sjálv skúlastovan tøk til tiltøk av ymiskum slagi, upplýsir Dávur Winther, mentanarsamskipari hjá Klaksvíkar kommunu.

Undan jólum var guðstænasta hildin í skúlanum. Tí sæst eitt altar inni í skúlastovuni, sum varð nýtt í hesum sambandi. Báðir prestarnir í Klaksvík hava havt guðstænastu har. Annars verður guðstænasta hildin í skúlanum í Mikladali, meðan kirkjan har verður umvæld.

Í løtuni verður skúlin á Trøllanesi nýttur sum venjingarhøli hjá einum bólki, sum næstan kann kallast multietniskur, tí hesin er settur saman av tónleikarum úr ymsum »ættum«: Einum av Viðareiði, einum úr Klaksvík, einum av Húsum og einum av Trøllanesi.

Annars er ætlanin, at skúlin eisini skal kunna veita ferðafólki tænastur í summar. Tað skal bera til at seta seg inn at bukka beinini, fáa sær ein bita og tílíkt. Eisini skulu smærri konsertir og tiltøk annnars vera í skúlanum.

– Tað er gleðiligt, at ein slíkur bygningur, sum hevur so stóran týdning fyri bygdina og oynna alla, nú aftur er komin til heiðurs og æru, sigur Dávur Vinther.

*snorri@sosialurin.fo*




*Skúlin verður brúktur til mong ymisk endamál, millum annað til gudstænastur*

*Mynd: Dávur Winther*




## Norðast til sunnast við Oyggjablaðnum

Síðani á vári í fjør hevur Sosialurin havt Oyggjablaðið sum eitt eykablað í hvørjum mikudagsblaði.

Her hava vit vitjað kring oyggjarnar, eins og vit hava tikið upp ávís viðkomandi evni, so sum veiðu, føroyska framleiðslu, bilar, fiskivinnu og bøkur.

Við hesum Oyggjablaðnum fara vit undir eina nýggja rundferð kring oyggjarnar, sum í stóran mun fylgir 7. breiddarstigi á heimsatlasinum.

Vit hava valt at kalla rundferðina »Føroyar – norðast til sunnast«. Ætlanin er at vitja flestu bygdir og oyggjar, ið liggja nærhendis hesum ása hetta komandi árið.

Ferðin byrjar nú á Trøllanesi og Mikladali, og í næstu viku verður vitjað í Sandoynni.

Góðan lesihug.